*- Konsertin gjørdist aukustisk sum eftir míni meining lyfti konsertina á eitt uppaftur hægri og krevjandi støði, skrivar Eirikur Skála m. a. í ummælinum*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



# Aukustisk konsert við mæta tónaskaldinum

**- Eg var ómetaliga vælnøgdur við konsertina við Bent Fabricius Bjerre, størsta og kendasta tónskaldið í kongaríkinum, skrivar Eirikur Skaala**

UMMÆLI
*Eirikur Skála*

Í góðverðinum síðsta sunnudag 11. juni var forvitnislig konsert í Norðurlandahúsinum við danska klaverspælaranum og tónaskaldinum Bent Fabricius Bjerre.

Undirritaði kennir sum fólk flest eyðkennisløgini frá Matador, Olsen Bandanum og Alley Cat, so tað var í so máta ikki nakað nýtt í tí, men spennandi bar at hoyra hvat annað hann hevur gjørt og um tað mundi vera líka gott sum áðurnevndu løg!

Eg má viðganga at eg fór ikki skuffaður avstað. Eg helt at hann fór at verða einsamallur á pallinum men hann hevði bæði kassaguitar, kontrabass, slagverk og sangara við.

Konsertin bleiv tí aukustisk sum eftir míni meining lyfti konsertina á eitt uppaftur hægri og krevjandi støði.

Eftir konsertina var eg ómetaliga vælnøgdur, ikki minst av tí at hava hoyrt tað kanska stórsta og kendasta tónaskaldið í danska kongaríkinum sum hevur smíða fleiri løg sum absolut øll kenna.

Samanumtikið ein sera góð og spennandi konsert.






TIL SØLU:

## Hugnalig sethús

við vøkrum urtagarði í Kálvagerði 4, úti á Fløtum í Tórshavn

**HÚSINI:**
Húsini eru sera snøgg og væl røkt.

**Uttan:** svartur timburklædningur, blá sprossavindeygu og flagtak.

**Innan:** Trip Trap ljós, lútaði, massiv trægólv, lútaði ljós træloft, massivar træhurðar, hvítur Uno Form køkur, góð og rúmlig skáp í sovirúmum og í vaskirúmi, luftventilatiónsskipan er í húsunum.

Í húsunum eru 3 sovirúm + 1 hjúnarrúm við egnum baðirúmi, stórt felags baðirúm, rúmligur køkur, rúmligt vaski/fýrrúm, 2 stovur – onnur við útgongd til hátún.

Húsini eru í einari hædd, 150 m², grundøkið 535 m², tey eru bygd í 1985.

Pláss er inni á stykkinum til 2 bilar, klárt at gera bilskýli.

**URTAGARÐURIN:**
Uttanfyri er alt gjørt av serkønum fólki, flísalagdar gøtur, hugnaligir krókar, steinbed, nógvir runnar og trø, lítil grasvøllur.

**ØKIÐ:**
Húsini liggja í veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvi úti á Fløtum. Her er stutt til barnagarðar (í Øksnagerði, við Landavegin, við Velbastaðvegin), Venjingarskúlan, matvøruhandil og bakara. Bussambandið er gott. Teinurin oman í býin tekur um 15 min. at ganga. Tað er frítt kring húsini og fríøki liggur beint frammanfyri.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað verða biðin um at seta seg í samband við Advokatvirkið - tlf. 312227, tlf. 225045.

## Advokatvirkið

Páll Nielsen, adv. Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 • Postsmoga 85 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • Fax 315874 • e-mail: advokat@post.olivant.fo